



*Valdemar og Mogens Lützen vóru við í konslaliðnum*

um, at flaggið var ein føroyskur spurningur.

## Valið fall á Merkið

Bretska flotaleiðskan strongdi á at fáa eina loysn. Hon kundi ikki liva við Dannebrog, men tók ikki støðu, hvat flagg tað annars skuldi vera.

Í fyrsta umfari var talan um eitt grønt flagg við hvítum krossi. Hetta førdi til fólkslig krøv um, at tað skuldi vera Merkið, sum varð viðurkent sum okkara flagg. Hetta kom eisini at at vera avgerandi fyri endaligu støðutakanina.

Ellen Lützen, kona Mogens, sum í dag er 98 ára gomul, hevur greitt frá, at teir fýra í konslaliðnum høvdu annars avtalað sín ámillum,



*Mason, tá ið hann kom til Føroyar*

at tað tilmæli, sum kom frá teimum í flaggspurninginum, skuldi vera einmælt. Einki skuldi koma fram, sum eingin semja var um.

Men kl. 17 tann 25. apríl fekk amtmaðurin bræv frá Mason um, at avgerðin varð fallin, og at Merkið skuldi veitra á øllum skipum alt samdøgrið.

## Bretum dámdu Merkið

Magni Arge, sonur Niels Juel, hevur gott innlit í hesi viðurskifti, og hann sigur:

Sir Frederick Mason hevði nokk ongan áhuga í føroyska flagginum. Hann varumboðsmaður fyri politisku skipanina gjøgnum bretska uttanríkisráðið. Teir ynsktu bara at finna ein loysn á flaggstríðnum, sum alllir partar kundu góðtaka, og donsku myndugleikarnir vildu yvirhøvur ikki vita av Merkinum. Hetta visti og respekteraði Mason.

Men bretska Admirality, flotaleiðslan, kundi ikki liva við, at málið var drigið út, tí tað bar ikki til at føroysk skip sigldu undir danska fíggindaflagginum. Tá ið teir sóu føroyska flaggið, sum Thor bar inn til Hetlands ella Aberdeen, sóu teir, at hetta flagg var júst tað sama, sum bretska rescue (bjargingar) flaggið. So var leyst og liðugt í Admirality. Teir sendu boðini um allan heim, atføroyska flaggið var skapað soleiðis.

Tá vóru menn svakir hjá donskum umboðum í London og í bretska diplomatinum, men gjørt var gjørt. Bretland var í kríggj og Admirality mátti tí handla.

## Stríðið um Thorstein Petersen

Í 1940 sendir p/F Uvak við Thorstein Petersen á odda skonnartina "Sonnu" til Amerika við føroyskum vørum - lýsi, revaskinni og ullvørum. Fyri sølupeningin komu teir heim við ymiskum neyðsynjarvørum, t.d. avíspappír.

Í 1941 var ætlanin aftur at gera eina líknandi ferð. Men bretsku myndugleikarnir vóru ímóti. Ein orsøk var, at bretar høvdu sjálvir brúk fyri hesi vøru sum t.d. lýsi. Ein onnur var misálit á Thorstein Petersen, sum stóð fyri einum harðligum andstøðupolitikki og teir óttaðust fyri at hann eisini fór at gera um seg uttanlands.

Thorstein fór til Amerika í sambandi við ætlaðu ferðini hjá Sonnu. Nógvur ivi var um, hvørt hann skuldi fáa útferðarloyvi og hevði Mason samskifti við bretskar myndugleikar um hetta.

Samstundis vóru royndir gjørdar at fáa Thorstein frá sum norskan konsul. Her var Mason eisini ein lyklapersónur. Men henda royndin eydnaðist so ikki.

Mason og bretar vóru í parti við amtmannin og politiska meirilutan í tinginum. Ein orsøk til illstøðuna við Thorstein og Fólkaflokkin var, at Mason hevði garanterað amtmanninum, at tað hendi eingin broyting í okkara støðu mótvegis Danmark, so leingi sum kríggið vardi. Hetta er nú lætt at skilja í dag.

Eitt annað øki, har Mason royndi at hjálpa føroyingum, var at fáa kanónir, so tað bar til at verja okkum móti týskum flogálopum. Hetta eydnaðist eisini sum frá leið.

Tá ið Mason fór úr Føroyum í 1943 gjørdist Norman Vorley konsul fyri hann.

## Sofus kendi Sir Frederick Mason

Sofus Poulsen, okkara maður í Aberdeen í meira enn hálva øld, kendi Mason, og skrivar soleiðis um hann:

"Tað fyrsta, eg minnist til konsul Mason var fyrst undir seinna heimsbardaga, tá ið eg gekk á realskúlanum í Tórshavn. Eg minnist væl, at hesin vakri ungi maður, 27 ára gamal, var so fínt ílætin. Hann gekk í Havnar gøtum eins og teir nógvu bretsku marinararnir og hermenninir.

Tað, sum eg serliga minnist til, er tá ið hann og danska Karen Rørholm, sum var assistentur hjá Kaaber tannlæknanum, giftust. Veðrið var ófýsið tann dagin, og eg minnist eisini, at okkara sera kenda lærarinna frk. Cohr, sum eisini var donsk, fór inn í Havnar kirkju til brúðarvígsluna. Hon var ílætin einum ljósagrønum "floating" kjóla. Vit vóru sjálvandi ikki von við at síggja hana í so fínum klæðum.

Valdemar Lützen var bretskur konsul frammanundan. Men nú seinni heimsbardagi herjaði, helt bretska stjórnin, at tað var neyðugt at senda ein av teirra egnu tænastumonnum frá uttanríkisráðnum til Føroyar at taka sær av øllum tí eyka arbeiðnum, sum bretska hersetingin av oyggjum okkara kom at føra við sær. Eg hugsi, at Mason var rætti maðurin at senda til Føroyar. Hann er mest kendur av okkara landsmonnum sum millummaður millum okkum og bretsku stjórnina og Winston Churchill. Ein avleiðing var, at okkara skip skuldu hava okkara egna flagg "Merkið" á stong, bæði í heima- og millumlandasigling. Henda avgerð varð tikin 25. apríl 1940.

Konsul Mason dámdi væl okkum føroyingar. Hann gjørdi alt, hann kundi fyri at hjálpa okkum í tí støðuni, vit vóru komin í vegna týsku hersetingina av Danmark. Tískil vóru vit noyddir at taka okkum av øllum, sum oyggjalandi okkara hevði fyri neyðini. Hetta merkti eisini samráðingar við bretsku myndugleikarnar.

Tað, sum okkara fiskiskip og sjómenn avrikaðu undir seinna heimsbardaga, og sum kostaði okkum triðingin av fiskiflota okkara eins og 200 manns, vóru bæði Mason konsulur og forsætisráðharrin Winston Churchill takksamir fyri.



*Robert Brockie var eisini varakonsul*

## Hittust í 1982

Tá ið løgmaður Pauli Ellefsen var boðin til Bretlands á almenna vitjan í 1982, vóru Árni Olafsson og eg við honum. Vitjað varð bæði í Hetlandi, á oljuboripalli og í Skotlandi og Onglandi.

Í London var vitjað í Parlamentinum, har vit hoyrdu forsætisráðharran Margaret Thatcher halda røðu um Falklandskríggið.

Seinni hevði Uttanríkisráðið fyrireikað morgunmat fyri løgmanni, har nógvir "fínir" gestir voru bodnir við. Sjálvur kom eg at sita undir liðuni av teirra manni í Uttanríkisráðnum, sum tók sær av The Scandinavian Desk. Eg varnaðist, at á gestalistanum var ein Sir Frederick Mason, og so vóru nevnd hansara heiðursmerkir.

Eg spurdi so hendan, um hann kundi kanna, um hetta møguliga kundi vera tann sami Mason, sum var bretskur konsul í Føroyum undir krígnum. Jú, so var. Vit fingu so høvi at tosa við Sir Frederick, og løgmaður Pauli Ellefsen bjóðaði honum og Lady Karen at koma til Føroyar á vitjan summarið aftaná.

Hesa vitjan vóru tey sera fegin um. Tey komu aftur á vitjan á 13. mai 1990 á bretsku vikuni í samband við 50 ára hátíðarhaldið fyri vinarligu bretsku hersetingini av oyggjum okkara.

Kann nevna, at mær eydnaðist at fáa Royal Marines orkestrið frá Rosyth, Gordon Highlanders sekkjapípuorkestur og mannskór, 50 manns, frá Wales við til hetta hátíðarhald. Harumframt komu 50 hermenn, sum høvdu verið í Føroyum undir seinna heimsbardaga eins og 15 Royal Scottish Highland Dancers frá Perthshire. Smyril gjørdi eina serferð til Scrabster eftir okkum. Tað vóru 8-10.000 fólk vóru á kaiuni, tá ið vit koma á Havnina uml. kl 23.30.

Sir Frederick og Lady Karen, sum vóru komin við flogfari, løgmaður, borgarstjóri og onnur vóru har at taka ímóti okkum.

Frammanundan var bretska fregattin HMS Brilliant komin og lá við kai.

Fyri at fáa allar hermenninar í samband við tey, sum teir skuldu